# Íslendingar niður í løn

Á fleiri arbeiðsplássum í Íslandi eru starvsfólk gingin við til at fara niður í løn orsakað av teimum trongu fíggjarkorunum í landinum. Í gjár boðaði felagið Árvakur, sum gevur út Morgunblaðið, frá, at lønin hjá starvsfólkunum lækkar fimm prosent frá næsta mánaðarskifti, samstundis sum onkrir lønarflokkar verða broyttir. Leiðslan í Árvaka sigur, at nú starvsfólkini hava góðtikið minni løn, sleppir felagið væntandi undan at siga fólki úr starvi.



# Philips koyrir til hús

Tann stóra niðurlendska tøknifyritøkan Philips kunngjørdi í gjár, at hon hevur ætlanir um at siga 6.000 fólk úr starvi, og at uppsagnirnar fara at raka felagsins deildir kring heimin. Philips hevur fyrr kunngjørt, at felagið hevði 186 milliónir evrur ella 1,4 milliard krónur í halli í 1008, og at úrslitið var serliga vánaligt tann seinasta ársfjórðingin. Til sammetingar kann nevnast, at í 2007 hevði Philips knappar 4,2 milliardir evrur ella 31 milliardir krónur í avlopi.



*Ársins privati leiðari í ár, Regin Jacobsen, er annað ættarlið av fólki "á Bakka", sum stendur fyri leiðsluni á Bakkafrost. Fyritøkan, sum fór av knóranum í 1992, og var um at kódna í 2002, tá ILA gjørdi um seg, er í dag størsta alisamtak í landinum við átta aliøkjum, trimum smoltstøðum, tveimum framleiðsluvirkjum og 230 starvsfólkum*

*Mynd: Leif Láadal*

## Regin Jacobsen

Regin Jacobsen
Føddur í 1966.
HD í roknskapi.
Ársins privati vinnulívsleiðari 2009.
Stjóri á Bakkafrost-samtakinum
Starvsfólk undir sær: 230
Frítíðarítriv: M.a. ættargransking

í Norðsjónum.

– Hatta gróthúsið bleiv brúkt til vinnuligt virksemið fyri meira enn hundrað ár síðani, fortelur Regin og peikar út í tún, í tí vit fara upp trappurnar til skrivstovuøkið.

Og meðan vit sessast, tendrar stjórin farteldu sína, og fortelur mær um hansara stóra frítíðaráhuga: Ættargransking. Og kanska ikki so løgið, so kann nógv av hesi gransking eisini setast í samband við vinnulívið á Glyvrum.

– Eg havi funnið útav, at her má hava verið vinnuligt virksemið á Glyvrum í eini 400 ár. Fyrsti festarin var Niels Jacobsen, sum var føddur í 1623, og hann var bæði bóndi og sýslumaður, umframt at hann eisini arbeiddi sum sorinskrivari eina tíð, fortelur Regin Jacobsen.

Øll innfødd Glyvrafólk stava frá hesum Niels Jacobsen, og ein standmynd av undangongumanninum hevði verið upp á sítt pláss, heldur Regin.

### Vaska klæðini fyri fólk

Bakkafrost-samtakið fevnir í dag um átta aliøkir, tríggjar smoltstøðir, tvær framleiðslueindir umframt høvuðsskrivstovuna á Glyvrum. Fyritøkan er somikið stór og somikið væl fyri fíggjarliga, at hon hevur ráð og hug at fjálga um starvsfólk síni.

– Fyri at kunna framleiða heimsins besta alilaks, tí tað er tað sum vit gera, sigur Regin avgjørdur, mugu vit eisini hava heimsins bestu starvsfólk, og tey hava vit eisini, leggur hann afturat.

Ein máti at fáa hesi starvsfólk, er at skapa nakrar karmar, har fólk trívast. Á sjálvum aliøkjunum eru fastarmannagongdir fyri, hvussu arbeiðið verður skipað. Har snýr tað seg um at fara væl við fiskinum og sær sjálvum. Hvørki starvsfólk ella fiskur skulu blíva strongd, tí tað sæst beinanvegin aftur á lidnu vøruni.

Inni á framleiðsluvirkinum á Glyvrum verður eisini nógv gjørt fyri at starvsfólkini skulu trívast. Millum annað skulu tey ikki hugsa um at vaska arbeiðsklæðir síni. Tað tekur fyritøkan sær av. Umframt at leggja stóran dent á at hava støðugt arbeiði til fólk, verður eisini gjørt nógv burturúr sjálvum arbeiðsumstøðunum. Tað nýggjasta átakið er at leggja ljóðdoyvandi loft uppundir alt virkið, so tað ikki er so nógvur larmur.

### Tað fakliga

Tá Regin Jacobsen varð valdur til ársins leiðari, var tað hann, sum varð valdur persónliga, men hendan heiður vil hann ikki eiga einsamallur. Hann er skjótur at nevna starvsfólkini í virkinum, og sjálvt um tað nokk er nakað, sum mann skal gera, so tykist hann ógvuliga sannførandi, tá hann sigur tað. Hetta kann hava nakað við tað at gera, at Regin er uppvaksin í fyritøkuni. Hann arbeiddi longu á skrivstovuni, tá hann gekk í handilsskúla, og tann fakligi kunnleikin, sum hann síðani hevur ognað sær, er eisini tikin, meðan hann hevur verið ein týðandi partur av familjufyritøkuni. Tað er blivið til eina HD-útbúgving í roknskapi og revisjón, sum varð tikin, meðan hann arbeiddi.

– Tað var eitt sindur løgið at arbeiða við fiktivum uppgávum, tá eg tók HD, tí eg var vanur at arbeiða við veruligum fólki og veruligum pengum, men tað var samstundis ein avbjóðing, og hesa fakligu barlast vildi eg als ikki verið fyri uttan, tó at tíðin á skúlabonki kundi kennast eitt sindur óverulig til tíðir, minnist Regin Jacobsen.

### Laksur, laksur og laksur

Tá sildin hvarv í 1977, mátti Bakkafrost finna upp á okkurt annað virksemið. Eitt sindur av sildavirksemi var framhaldandi, men als ikki í so stóran mun sum áður. Tí varð m.a. farið at pakka flatfisk fyri fiskavirkir, eins og roynt var at fáa eitt sindur av virðisøking burturúr svartkjaftinum, sum var tað nýggjasta slagið av fiski á marknaðinum.

Síðst í 70-árunum og upp gjøgnum 80-árini var Bakkafrost eitt sindur "óstruktureráð", fyri at brúka eitt orð hjá Regini Jacobsen. Lutfalsliga nógv arbeiði var av svartkjaftinum, og stórar íløgur vórðu gjørdar í maskinur, sum skuldu útvinna surimi. Men svartkjafturin kastaði ongantíð nakað serligt av sær. Innfrysting av makreli var eisini á breddanum, men hetta gav heldur ikki so nógv. Tá var øðrvísi við alingini, sum byrjaði í 1979. Hon var beinanvegin eitt gott bein hjá Bakkafrost, og fyritøkan setti sum frá leið fóðurframleiðslu í gongd og keypti sær bæði kassa- og roykivirki.

Í 1992, tá alt samfelagið fór av knóranum, hoknaði Bakkafrost sum kunnugt eisini.

– Eg minnist, at eg tá helt tað var ein ósigur fyri okkum, men í dag dugi eg væl at síggja, at húsagangurin hevur verið við til at myndað tað fyritøku, sum vit hava í dag, sigur Regin Jacobsen.

– Kanska hevði Bakkafrost-samtakið ikki verið til, um virkið ikki stongdi í 1992, leggur hann afturat.

### Altjóða góðkenningar

Skil er í dag á strukturinum, og virksemið hjá Bakkafrost-samtakinum snýr seg í løtuni bara um eina vøru: Aldan laks. Váðaspjaðingin er síðani løgd í tað at vera við heilt frá rokni til lidna vøru. Bakkafrost-fyritøkan kann errin fara út í heim og fortelja kundum sínum um hvønn nikk og prikk í framleiðsluni.

– Og tað er júst tað, sum kundin spyr um. Hann vil hava at vita, hvar smoltið er framleitt, hvat fyri fóður tað fekk, hvussu alilaksurin er kruvdur, hvussu hann er skorin og pakkaður og alt møguligt annað, fortelur Regin Jacobsen.

Fyri at lætta um hetta arbeiði, hevur Bakkafrost-samtakið fingið tvær viðurkendar útlendskar framleiðslugóðkenningar – BRC og IFS. Harafturat fegnast Regin Jacobsen um møguleikan, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur fingið, tá tað snýr seg um at góðkenna virkir fyri russiskar myndugleikar.

– Tað vísir, at vit í Føroyum eru við heilt frammi, og vónandi verður tað næsta, at føroyskir myndugleikar fáa hendan møguleika frá øðrum londum enn Russlandi, sigur Regin Jacobsen.

# Heimsins besti laksur

**Tú skalt ikki hava tosað leingi við stjóran hjá Bakkafrost-samtakinum, Regin Jacobsen, áðrenn tú hoyrir hann nevna føroyskan alilaks, sum heimsins besta alda laks. Tað ljóðar flott, og tað er tað eisini, tí tað er ikki bara Regin Jacobsen, sum sigur tað. Tað eru tað eftirhondini eisini fleiri og fleiri útlendskir keyparar, sum hava varnast.**

**Grundgevingarnar hjá Regini Jacobsen byggja millum annað á kanningar, sum eru gjørdar uttanlands. Kanningar, sum vísa at føroyski aldi laksurin hevur nógv størri innihald av teimum gagnligu omega3-sýrunum enn flestu kappingarneytar. Tær vísa eisini, at føroyski laksurin er fríður fyri antibiotika, umframt at hann fær fóður, sum ikki er genmodifiserað.**

**Tá hesi kemisku fakta verða løgd saman við umstøðunum at ala í Føroyum, har tættleikin er lágur í ringunum, havið er reint og skipanir eru gjørdar fyri sjúkufyribyrging við t.d. at brakkleggja og árgangsskilja, so hava vit heimsins besta alda laks, heldur ársins leiðari 2009, Regin Jacobsen.**



*Umfram Regin Jacobsen, vóru Bjarni Askham Bjarnsson, stjóri hjá Kall, og Jan Müller, blaðstjóri, innstillaðir til Ársins privata leiðara í ár.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*